# Nú skal VB standa royndina

**Við útidystum móti bæði Stjørnuni og Neistanum er talan mest sum um sannleikans tíma hjá føroyameistarunum**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Talan verður um rúgvusmikið umfar í kvinnuhondbóltinum. Ikki færri enn sjey dystir standa á dystarskránni, og tað er ikki sørt, at útfallið av hesum fer at gera av, hvussu oddastøðan í grundspælinum fer at laga seg.

Ikki minst verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer, tá VB í tveimum umførum skal royna seg móti sambiðlunum í oddinum. Leygardagin er talan um útidyst móti Stjørnuni, sum fram til seinasta vikuskiftið tóktist mest sum í serflokki. Men sum við tapinum fyri Kyndli rættiliga kom niður á jørðina.

Og sunnudagin skulu meistararnir so á vitjan hjá Neistanum, sum í ár veruliga hevur hótt við at arga tey »stóru«, men sum higartil kortini hevur manglað seinasta og avgerandi fetið.

**Styrkisroynd í niðaru hálvu**

Men fimm aðrir dystir verða so eisini á skránni. Ikki minst verður spennandi at vita, hvørt Kyndil megnar at halda fast í hugaligu gongdini, nú tær skulu spæla móti Søljuni og VÍF.

Neistin má roknast sum stórfavorittur, tá tær leygardagin taka móti StÍF, og tað sama má sigast um Stjørnuna, sum sunnudagin skal spæla seinna heimadystin hetta vikuskiftið. Hesa ferð móti Tjaldri.

Seinasti dysturin er á Skála sunnudagin, tá StÍF tekur ímóti Søljuni. Ein dystur, sum kanska ikki hevur so nógv at siga fyri oddastríðið. Men sum hinvegin kann geva eina greiða ábending um, hvat av liðunum er best fyri, tá tað í vár verður kappast um, hvør skal sleppa upp um strikuna, sum frá komandi ári fer at skilja tey seks ovastu frá restini.


*Tvær ferðir hetta vikuskiftið skal VB upp til sanna styrkisroynd. Fyrst í Klaksvík og síðani í Havn*

# Kyndil kann staðfesta oddasessin

**Verður talan eisini um sigur í Vestmanna, ber illa til at ímynda sær, at Kyndil fær kapping um oddasessin hesumegin jólasteðgin**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Ein javnleikur í fyrsta dystinum. Tað er einasta stigið, sum mansliðið hjá Kyndli hevur latið frá sær higartil í grundspælinum, og fyribils hevur tað verið nóg mikið til at staðfesta ein tryggan oddasess í deildini.

Sunnudagin er so talan um kanska harðastu royndina av øllum, tá liðið fer á vitjan í Vestmanna. Tað kann væl vera, at ársins útgáva av VÍF tykist nakað veikari enn meistaraliðið frá í vár, men fyri tað munnu allir í Kyndils-leguni vera greiðir um, at talan er um harða uppgávu.

Undir øllum umstøðum, so plagar talan at vera um tættar dystir, har báðir partar bæði geva og taka av fullum hjartað, og í so máta verður talan neyvan um undantak hesaferð.

Samstundis skulu StÍF og H71, sum saman við VÍF royna at elta Kyndil, dystast á Skála. Fyrra dystin millum liðini vann H71 so ruddiliga. Men StÍF er nakað væl sterkari nú, enn teir vóru fyrstu umførini, og tí er væl hugsandi, at talan verður um eina nakað væl truplari uppgávu hjá hoyvíkingunum hesaferð.

Seinasti dysturin sunnudagin er botnuppgerðin millum Neistan og KÍF. Hvørgin parturin sær út til at gera nakrar serligar skreytir í ár. Og fyrst og fremst man dysturin hesaferð snúgva seg um at fáa nakað av sjálvsálitið í spælarahópin.


*Talan er vanliga um harðar og intensar dystir, tá VÍF og Kyndil dystast. Og talan verður um undantak í so máta, tá ársins næsta útgáva av hondbóltsklassikaranum stendur á skránni sunnudagin*

**Hondbóltsstøður**
**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 230 | 144 | 86 | 14 |
| 2 Neistin | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 243 | 175 | 68 | 14 |
| 3 Kyndil | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 176 | 173 | 3 | 12 |
| 4 VB | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 160 | 106 | 54 | 10 |
| 5 VÍF | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 238 | 243 | -5 | 8 |
| 6 StÍF | 8 | 3 | - | 0 | - | 5 | 190 | 204 | -14 | 6 |
| 7 Søljan | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 138 | 218 | -80 | 2 |
| 8 Tjaldur | 9 | 0 | - | 0 | - | 9 | 154 | 266 | -112 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 7 | 6 | - | 1 | - | 0 | 193 | 161 | 32 | 13 |
| 2 H71 | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 207 | 165 | 42 | 9 |
| 3 VÍF | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 197 | 197 | 0 | 8 |
| 4 StÍF | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 179 | 186 | -7 | 8 |
| 5 KÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 164 | 196 | -32 | 2 |
| 6 Neistin | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 184 | 219 | -35 | 2 |

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur - Sunset-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 19.11 | 15.00 | Søljan-Kyndil | Kristian & Sámal |
| 19.11 | 15.00 | Neistin-StÍF | Rúni & Ragnar |
| 19.11 | 15.00 | Stjørnan-VB | Hallur & Petur |
| 20.11 | 14.30 | Neistin-VB | Eyðun & Andreas |
| 20.11 | 14.30 | StÍF-Søljan | Karsten & Kristian |
| 20.11 | 15.00 | VÍF-Kyndil | Heri & Dánjal |
| 20.11 | 15.00 | Stjørnan-Tjaldur | Kári & Dánjal |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.11 | 16.00 | Neistin-KÍF | Eyðun & Andreas |
| 20.11 | 16.00 | StÍF-H71 | Karsten & Kristian |
| 20.11 | 16.30 | VÍF-Kyndil | Heri & Dánjal |

**Flogbóltur - Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 19.11 | 14.00 | KÍF-Mjølnir | ÍF |
| 19.11 | 15.00 | TB-SÍ | Dráttur |

**Flogbóltsstøður - Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 TB | 4 | 2 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 4 |
| 4 Mjølnir | 4 | 2 | - | 2 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 5 ÍF | 5 | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |
| 6 KÍF | 5 | 0 | - | 5 | 4 | 15 | -11 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 4 |
| 4 Mjølnir | 4 | 1 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| 5 Nøvan | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |